# “Eg havi verið ein túr í Belfast”

Einherji Olsen er havnamaður og hevur starvast á Skipafelagnum síðani 1994. Hann fer ikki at gera nakran uttanlandstúr í summar, men verður heldur her heima.
– Nei, eg fari ongan veg í summar, sigur Einherji, sum kortini hevur verið uttan fyri landoddarnar í ár. – Ja, fyrr í ár vóru vit í hornorkestrinum ein túr í Belfast í Norður Írlandi. Tað var ein óførur túrur, har vit eisini fingu tíð til annað enn at spæla. Ferðalagið var stórt, góð 60 fólk mundu vit vera. Vit vóru við í eini kapping har, tað gekk væl og vit vórðu nummar tvey, greiður Einherji Olsen frá, sum hevur spælt horn síðani tíðliga í 50-unum. – Vit plaga at venja tvær ferðir um vikuna, eini tveir tímar hvørja ferð, og í løtuni venja vit fram ímóti Ólavsøku, sigur Einherji, sum var úti og spákaði sær ein túr í góðveðrinum í dag, tá Sosialurin hitti hann, og fregnaðist um hansara summarætlanir.



5 707265 100067 >




















